# Nýggj Rita á sumri 2008

JÁKUP AV SKARÐI
Nólsoy



Yvirskriftin ljóðar kanska í so optimistisk. Lesarin hevur kanska huga at siga: "Nei, hatta ber ikki til". Men! Hatta ber til! Arbeiðsbólkurin, ið hevur til endamáls at fáa til vega nýggja ferju at røkja farleiðina Nólsoy-Tórshavn, hevur í skjótt eitt ár víst á tørvin at nýggja ferjan røkir farleiðina á sumri 2008.

Arbeiðsbólkurin hevur verið í jaligum samskiftið við Jacob Vestergaard, landsstýrismann, síðani faldarin varð handaður honum 9. januar 2006. Eisini hevur samskiftið við Tórshavnar Skipasmiðju og Strandferðaskip Landsins verið gott. Men nú brádliga – eftir ¾ ár í góðum samskifti – stendur fast! Nú ber ikki til at fáa pening til annað enn projektering.

Tað kann ikki verða rætt, at eftir stóra arbeiði at fáa til vega Teistan, skal projekteringin til nýggja Ritu verða tað einasta í kann fáast av skafti í 2007. Øll tey, ið eru von at verða í pappírsmeldrinum tá skip skal byggjast, vita at projektering, útbjóðing og met-ing av tilboðum kunnu fáast ígjøgnum á ½ ár. Harafturat eru øll tølini í sambandi við Teistan tøk og greið, samstundis sum SSL hevur dagførd tøl fyri Rituna.

Tí er tað sjálvsagt, at er hugurin til at stuðlað verkætlanini fult út, so kann byggingin fara í gongd í juni 2007 og so røkir nýggja ferja samferðsluna á ólavsøku 2008.

Tað hevur verið frammi í fjølmiðlunum, at vetnisverkætlanin í Nólsoy er gott høvi at byggja fyrsta skipið, ið nýtir vetni. Hesum tekur arbeiðsbólkurin sjálvsagt fult undir við, men tað kann ikki koma upp á tal, at tað hevur við sær at "Ritan" sum siglir nú skal røkja farleiðina í 5 ár afturat.

Arbeiðsbólkurin tekur fult undir við ætlanunum undir hugtakinum "grøn oyggj" og at tað sjálvsagt er upplagt at nýta hetta høvi at bera Føroyar fram í altjóða samskiftinum. Men vit skulu samstundis hava í huga at nýtt skip fyri langari tíð síðani átti at verið bygt.

Arbeiðsbólkurin hevur frá fyrsta degi havt í huga, at á sumri 2008 kundi nýggja ferjan røkja farleiðina. Hetta hevur verið okkara meting, bæði út frá tí fundarvirksemi vit hava havt við politikkarar og skipasmiðju og eisini út frá tí tvørliga gerandissamferðslu, ið vit eru bundin av hvønn einasta dag.

Sjálvsagt kann nýggja ferjan verða fyrimynd og nýta vetni. Men talan má vera um at byggja skipið, soleiðis at tað er tøkt á sumri 2008, fyri síðani at skifta til vetnis-tøkni, tá ið kunnleikin er til tað, um tað so er um 5 ár – ella longri frammi í tíðini.

Besta høvi at "selja vøruna" og vísa á hvussu týdningarmikið tað er at nýta vetni, má vera at kunna vísa á røtt tøl og síggja munin á vanligum motorum og vetnis-motorum. Tí er einki meira logiskt enn at byggja skipið við vanligum motorum nú og síðani skifta motorarnar, tá ið vetnis-tøknin er tøk. So hava vit eins grundarlag at lýsa munin: Farleiðin, summar/vetur, títtleiki og sjálvsagt orkuprísir.

Fyri at taka í aftur sumt, ið ført hevur verið fram í smb. v/ tørvin, verður víst á hesi punkt:

- Alt ov tvørligt er at fara við Rituni, um tú ert bundin av koyristóli, illa gongd/-ur, hevur barnavogn ella bara hevur nógv viðføri við tær
- Skal nakað takast við, ið er breiðari enn landgongin, so skal tað handast umborð – og harvið lyftast upp um høvd
- Hevur onkur áhuga at taka sær bilin við, ella kanska nýtt innbúgv, so skal hetta við krana lyftast í land – tá er neyðugt at tekna eyka trygging, um nú okkurt óhapp hendir
- Er onkur deyður, so skal kistan førast í last – ið eisini verður nýtt til mat og rusk – fyri síðani aftur at lyftast høgt upp í loft og niður á keiina. Hugsi tykkum til, um óhapp einaferð hendir!
- Skulu hús byggjast, so skal alt tilfarið lyftast umborð í Havn, lyftast í land í Nólsoy og síðani við bili/traktori á byggiplássið

Vónandi hevur SSL longu gjørt forarbeiði, at kanna tekningar uttanlands fyri at finna dømi um nýtiliga ferju – tí so er sjálvsagt lættari hjá Jacob Vestergaard, landsstýrismanni, at lýsa til fundar at práta við bygdarfólkið um tær ætlanir hann hevur arbeitt við hesar 9 mánaðirnar ráð hansara hevur havt verkætlanina um hendi.

Arbeiðsbólkurin vil inniliga heita á allar politikkarar og onnur, ið kunnu ávirka undirtøkuna fyri verkætlanini at gera sítt til at játtaðar verða 15 milliónir á fíggjarlógini 2007 – fyri síðani at játta aðrar 15-20 milliónir krónur á fíggjarlógini 2008.

Við ynski um at farleiðin Nólsoy-Tórshavn í ár 2008 er dagførd!

# Reversibla Loysingarbrúgvin

VIRGAR T. DALSGAARD

### Kjøpinhavnska oasan hjá tjóðveldismonnum

Millum býarpartarnar *Vesterbro* og *Islands brygge* í landsynnings-Kjøpinhavn eru menn í løtuni við at leggja síðstu hond á eina nýggja brúgv, sum liggur ein knappan kilometur frá Longu brúgv og parallelt við hana! Nýbrúgvin kemur at binda risastóru keypsmiðstøðina ***Fisketorvet*** á Havnahólminum saman við tann futuristiskt nýbygda býarpartin Amagermegin, har eitt ótal av eigaraíbúðum eru bygdar seinastu fimm árini á gomlum verksmiðju- og pakkhúsgrundum!

Hetta er ikki heilt vanlig brúgv – hon er bara fyri cyklistar og spákandi fólk – og so kann hon *lættliga loysast og bindast aftur,* so skip fáa siglt "gjøgnum" hana. Brúgvin verður *ikki lyft* sum Langabrúgv – hon verður *bara snarað*! Hon líkist meira einum listarverki enn eini brúgv og kemur ætlandi at minka nógv um cyklu- og fótferðsluna eftir Longubrúgv! Hetta gleðast lesandi, rennandi og onnur ikki bilbrúkandi fólk seg nógv til, tí ørgrynni av fólki skal hvønn dag ut á Amager, t.d. til Universitetið, flúgvuplássið ella glæsiliga nýggja útvarpshúsið.

K e y p m a n n a h a v n a r kommuna hevur avgjørt, at brúgvin skal lata upp komandi hósdag, tað er *fjúrtanda september*! Hetta er sama dag, sum tjóðveldismeinigheitin heldur sín trýss ára dag fyri fólkaatkvøðuna í 1946; eitt "hátíðarhald" sum bara prógvar, at loysingarmenn ongantíð hava hirt at sett seg inn í elementera matematikk! Teir jamra seg alsamt sum orientalskar grátikonur og vanskepla alla vanliga procentokrning!

Sjálvt um nógvir av oddamonnum tjóðveldisfloksins hava havt síni allarbestu ár í tí yðjandi skemtiliga býarmeldrinum í Kjøpinhavn, og ofta leingjast ønskriliga aftur til Oyrasunds, er tað kortini ikki víst, at yvirborgmeistarin, *frúgvin Ritt Bjerregaard* er so beistaktig, at symbolikkurin við *loysingarbrúnni og 14. september* er ætlaður teimum! Men her er ríkiligt lóður til tjóðveldis-paranoia í nógv ár: *Ritt profanerar jú merkisdagin hjá loysimonnum!*

### Tað fossar alsamt niður í teir norðuratlantisku nassararnar

Hjá gløggum loysingarfólki ber væl til at øva seg á og við brúnni; – tí henda loysingarprocessin gongur báðar vegir, so lættliga kann bindast aftur. Processin er næstan ófarlig!

Heilt øðrvísi er við tí juridisku føroysku hjálparloysingini hjá teimum óstortsligu tjóðveldisfantastunum. Har vendist illa aftur, tí tann processin er ikki reversibul!

Higartil er mær vitandi bara eitt land, sum hevur loyst og er komið krúpandi aftur fyri at binda, og tað er *New Foundland*, tá ið teir **í 1933** fóru *Canossagongd* til Canada! Men nú vil onkur vera við, at Cook-oyggjarnar, sum loystu frá New Zealandi í síni tíð, eisini hava verið og biðið miriliga um nýtt band, tí tað gongst ikki so væl hjá Cook-monnum, síðani loysingina! (Onkur minnist kanska enn tað komiska *Cook-argumentið* úr Hvítubók hjá fullveldisjassunum)!

So allarhelst áttu tær norðuratlantisku bløkurnar frá hósdegnum av farið at avmarka sítt troyttandi loysingar-roks til ***ta donsku loysingarbrúnna í Kjøpinhavn***. Har kunnu teir loysa fleiri ferðir um dagin og binda aftur eisini - púra gratis! Og so er heldur ikki so langt yvir á Christiansborg, har teir bæði verða hýstir, gøddir og klæddir av blíðum dønum! Hetta er púra risikofrítt, ikki minst fyri tann norðuratlantiska biddaraposan!

Skuldi nakar enn ikki vitað tað, so hava hesar tríggjar fíggjarhetjurnar, *sum vilja brenna allar brýr*, Kleist, Johansen og Hoydal *árliga* útvegað sær slakar *800.000 krónur hvør* í eykaveitingum, sum aðrir fólkatingsmenn ikki fáa. Hetta er teirra privati blokkur, sum er at rokna sum donsk skattgjaldaramasochisma! Tí peningurin verður einamest brúktur til at spilla Danmark út fyri, *sorla allar brýr* millum londini og annars spæla sær í tí spennandi Kjøpinhavn!

Henda privata blokkin hava teir snultað sær til, samstundis sum teir hava skorið blokkin til vanliga føroyingin niður við einum triðingi! Eg forstandi væl, at Keypmannahavn er tjóðveldis-monnum sera kærur – men *aðrir* føroyingar mugu bara ikki sleppa at fáa lut í øllum teimum lukrativu fyrimunum, sum bæði farnir og núlivandi tjóðveldismenn hava notið í meira enn trýss ár sum sorgleysir lukkuriddarar í hesum gestablíða, tolna og stakliberala býi!

# Ótilvitaður innflutningur av djorum og skordýrum

JENS-KJELD JENSEN
Fuglaútstappari
Nólsoy

Tann 2. august 2006 var eg við í sendingini "Góðan morgum Føroyar", har eg tosaði við Elis Poulsen og Bjarna Mohr, um vansan við millum annað vespum og ymiskum øðrum livandi verum, sum vórðu innfluttar ótilvitandi til Føroyar við millum annað plantum í urtapottum og øðrum.

Tað ljóðar heilt ótrúligt, tá man hugsar um, hvussu hørð krøv londini seta kring okkum, tá tað snýr seg um innflutning av plantum; men í Føroyum hava vit enn onga lóg hesum viðvíkjandi!

At allar hesar plantur og djór, ið verða innflutt, eru til óbótaligan skaða fyri tað viðbreknu føroysku náttúruna, skal eingin verða í iva um!

Í tíðindunum í útvarpinum sama dag kl. 18.30, helt landsdjóralæknin, at eg "málaði fanan upp á veggin", tí eingi "eksotisk" djór kundu trívast og nørast í Føroyum.

Líknandi ørvitistos havi eg ikki hoyrt áður!

Hevði tað í minsta lagið verið ein minni mentur, ið tosaði so, hevði eg skilt tað; men tá hetta kemur frá ein av landsins hægst løntu embætisfólkum, má eg tala at!

Eg haldi tað eisini verða ófatuligt, at ikki ein einasti lívfrøðingur ella nakar av okkara fólkavaldu hava latið við seg koma. Er tað tí teir ræðast valdið hjá hjá landsdjóralæknanum?

Tá samanum kemur, vóni eg ikki, at orsøkin er, at eingin leggur í at verja føroysku náttúruna?

Einki er lættari enn at láta sum einki, tá man trýr, at tað man helst fara at ganga alíkavæl!

Frøðingar meta, at hvørja ferð 100 ymisk sløg av plantum, skordýrum, sogdjórum og fuglum verða innflutt til eitt land, so fer eitt av hesum sløgum at trívast og festa røtur.

Hetta vita so flest øll uttan landsdjóralæknin!

At enda vil eg nevna nøkur dømi av innfluttum "eksotiskum" djórum, sum hava haft, og enn hava stóran týdning í tí føroysku náttúruni.

Brún rotta (Rattus norvegicus): Kom upprunaliga úr Asia og Kina: Í samanlagt 239 ár hevur tann brúna rottan týnt í minsta lagið 75% av tí føroyska fuglastovninum so sum lunda, skrápi og drunnhvíta. Tey komandi 100 árini fer hon helst at kunna oyða eini 15-20% aftrat av teimum, ið enn eru aftir!

Húsvætti brúna (Hofmannophila pseudospretella): Kom upprunaliga úr Norðuramerika, og er í dag vanligt kring allar Føroyar. Tess ormverur eta nærum alt, og hava gjøgnum árini oyðilagt bæði klæði og mat fyri eitt stórt peningavirði.

Tjóvaklukka (Ptinus tectus): Kemur úr Australia og er í dag vanlig kring allar Føroyar, har hon ger sama skaða sum húsvætti brúna.

Flatmaðkurin (Artioposthia triangulate): Kemur úr New Zealandi, og fer næstu 50 árini at eta umleið 90% av føroysku reyðmaðkunum – og hetta er ein ólukka í mínum eygum!

Til ta tíð verðir eingin reyðmaðkur eftir at gera mold og súrga hana. Og hvussu verður tá við øllum fuglunum, ið liva av reyðmaðki?

Morsniglinin (Arion lusitanicus): Kemur úr Spania. Ja, her krevst helst eingin nærri frágreiðing…

Vespurnar (Paravespula vulgaris): Krevja væl heldur ikki gjøllari frágreiðing!

Hesi fáu nevndu innfluttu "eksotisku" djór, koma úr so fjarskotnum londum sum Kina, Danmark, Australia, New Zealandi, USA og Spania - og øll tykjast trívast væl her á landi. Ja, eg havi hug at siga, betri enn væl – og tað gera tey, hóast landsdjóralæknin sigur, at eg taki feil, og at eingi "eksotisk" djór trívast í Føroyum!



*Morsnigl*

Eg haldi, at ein embætismaður, ið kemur við tílíkum útsagnum, er til óbótaligan skaða fyri ta føroyski náttúruna!

Hevði eg rátt á borgum, hevði eg biðið mannin stungið í sekkin beinan vegin!

Latum okkum ikki gloyma, at tað var júst sami maður, ið royndi at ræða lívið úr fólki við sínum ørvitistosi um fuglakrím. Hevði hann aleina rátt, hevði eingin heimafuglur verið í Føroyum í dag.

Eg tori ikki at hugsa um, hvussu endin hevði verið, høvdu vit ikki tá havt landslæknan og landsapotekaran "sitandi hinumegin borðið" til at at sissa og tálma fólk…